Oljugiganturin ChevronTexaco í Norðurlandahúsinum:

# – Vit vilja lodda dýpið við Føroyar

**Fimtstørsta oljufelagið í heiminum, ChevronTexaco verður helst við í komandi oljuleiting á føroyska landgrunninum. Umboð fyri felagið eru komin higar fyri at lodda dýpið og læra nakað meira um leiting her. Samtíðis fara tey undir at bora tveir brunnar við markið. Úrslitið kann verða avgerandi fyri endaliga áhugan fyri Føroyaøkinum. Og møguleikin fyri at finna olju og gass er eitt til trý sigur Sabine Rosemary Johnson, stjóri, og tað er gott**



*Sabine Rosemary Johnson, stjóri í ChevronTexaco væluppløgd í Norðurlandahúsinum týsmorgunin, tá oljuráðstevnan varð sett. Hon sær fram til tveir spennandi og gevandi dagar*

OLJURÁÐSTEVNA

*Jan Müller*
*Myndir: Jens K Vang*

– Vit eru komin til hesa ráðstevnuna fyri at møta fólki og læra nakað um leiting við Føroyar. Hetta er tað fyrsta, Sabine Rosemary Johnson, stjóri í ChevronTexaco hevur at siga Sosialinum, tá vit hitta hana í Norðurlandahúsinum tíðliga týsmorgun, tá hon og umleið 120 útlendskir oljuserfrøðingar av ymsum slag seta hvørjum øðrum stevnu – fyri at tosa um føroysku undirgrundina og møguleikarnar at finna olju og gass her.

Saman við Sabine Rosemary Johnson á oljuráðstevnuni í Havn er eisini Richard Hinkley, bólkaleiðari fyri Atlantsmótið við. Hann stendur fyri tí tekniska partinum.

Hetta risastóra oljufelagið, sum fyri ikki so langari tíð síðani vóru tvey meðalstór oljufeløg, Chevron og Texaco, er eitt av teimum altjóða oljufeløgunum, sum hevur stórt virksemi á Atlantsmótinum og brúkar nógva orku til leiting í hesum økinum, sum Føroyar eisini eru ein partur av. Texaco søkti á sinni um leitiloyvi við Føroyar, men gjørdist ov stutt tá avtornaði. Nú hevur so samanlagda ChevronTexaco, ið er tað fimtstørsta oljufelagið í heiminum, sett kós móti føroyska landgrunninum eisini.

Sabine Rosemary Johnson sigur, at felagið í summar fer at vera við í tveimum brunnum á



*Ein løta, sum kann fáa postivar avleiðingar fyri leiting við Føroyar í framtíðini. Umboð fyri Statoil og ChevronTexaco skriva undir sáttmála, har m.a. Statoil "farmar inn" ella verður partur av loyvi bretsku megin markið, har ChevronTexaco er fyristøðufelag. Ein náttúrlig avleiðing av hesum samstarvi kann hugsast at vera, at Statoil, sum er virkið á landgrunninum og ChevronTexaco í felag fara undir at bjóða uppá øki í 2. rundu. Hini feløgini, sum eru við í undirskrivingini eru Dong og OMV*

*Mynd ChevronTexaco*












*Kortið vísir Atlantsmótið og nakað av tí virksemi, sum hevur verið og verður næstu árini. Tveir brunnar verða boraðir beint við markið í summar, har ChevronTexaco er við. Vónirnar til at finna olju og gass í rakstarverdugum nøgdum eru stórar – eitt til trý - og úrslitið fer at hava týdning fyri, hvønn leiklut fimtstørsta oljufelagið í heiminum fer at spæla á føroyska landgrunninum í framtíðini. Kort Statoil og Sosialurin.*

bretskum øki, beint við føroyska markið. Annar er Rosebank, sum liggur rættiliga norðaliga. Tann brunnurin verður boraður saman við Statoil, Dong og OMV. Hin brunnurin, sum er nakað syðri, Cambo nevndur, er eitt fund, sum varð gjørt nakað herfyri, og sum verður mett at vera rakstrarverdugt. Men tað skulu avmarkingarbrunnar borast fyri at staðfesta hetta. Aftrat hesum báðum brunnum er ChevonTexaco eisini við í spennnadi gassboringini í Laggan-fundin-

*Framhald á s. 18*




